

## Kórsangurin 2010:

- Í ár eru 80 ár liðin síðani fyrsti kórsangurin varð sungin undir tinghúsinum ólavsøkudag.
- Tá høvdu Jógvan Waagstein, tónaskald, og Edvard Mitens, tingformaður, skrivað kantatu til 900 ára minnishaldið um Ólav hin Heilaga.
- Hendan fyrsta kantatan, sum í ár er 80 ára gomul, verður aftur á skránni hesa ólavsøkuna.
- Fyrsta kantatan er skrivað fyri manskór. Tá var tað Havnarkórið, sum framførdi, men nú er kórið vorðið eitt blandað kór við sangarum úr øllum landinum.
- Solistur í ár verður Herfinnur Árnafjall, ið er virkin solosangari í Týsklandi.
- Umframt at syngja solo í kantatuni, veðrur Herfinnur Árnafjall eisini solistur í tveimum øðrum sangum, sum verða framførdir.
- Umframt kantatuna verða eisini tveir aðrir manskórsatsir eftir Waagstein framførdir, fyri at heiðra minnið um tónaskaldið.
- Kvinnurnar koma uppí sangin, tá sangurin um høvuðsstaðin Tórshavn hjá Poul F og Hans Jakku Højgaard verður framførdur, og tá tjóðsangurin verður sungin.

*Sera nógv fólk savnast á Vaglinum ólasøkudag eftir kirkjugongd at lýða á stóra ólavsøkukórið*



*Í fjør var kantatan hjá Sunleifi Rasmussen framførd, men í ár verður farið aftur til fyrstu ólavsøkukantatuna, sum Waagstein og Mitens skrivaðu fyri 80 árum síðani*